Jan úr Vestmanna

# Arbeiðir sum modell í

Hóast 20 ára gamli Jan Smith úr Vestmanna bert er 1.73 metur til hæddar, arbeiðir hann í løtuni burturav sum modell bæði í Danmark, London og aðrastaðni.

**MODELL**
**Lív Højsted Horsdal**
**horsdal@sosialurin.fo**

– Eg gangi ikki nógv »catwalks«, tí hæddina havi eg ikki júst við mær í skjáttuni, men eg taki myndir í hópatal. Eg havi víst klæðir fram fyri fleiri klædnahandlar – eitt nú Commes des Garcons, ið er ein kendur mótahandil. Somuleiðis havi eg verið við í fleiri myndarøðum og lýsingaátøkum í USA, Fraklandi, London, Danmark og Svøríki og verið modell í fleiri myndaframsýningum og bløðum – eitt nú Perfekt Magasine, ið hevur ligið á handilsdiskinum í heili 45 londum í heiminum, sigur 20 ára gamli Jan Smith úr Vestmanna, tá hann ein dagin kom framvið í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

### Uppdagaður á gøtuni

Jan fór at arbeiða sum modell fyri um tveimum árum síðani og varð í roynd og veru uppdagaður mitt á handilsgøtuni í Århus:

– Ein maður kom og pikkaði meg á økslina og bað meg koma við til casting í Århus. Seinni vísti tað seg so, at maðurin var Casper Van B, ið stendur á odda fyri einum modellmiðdepli í London.

Saman við Caspari Van B fekk Jan veruliga smakkin fyri modellarbeiðnum. Men hóast hetta valdi Jan tó at flyta til Keypmannahavnar at ganga á studentaskúla.

### Til Keypmannahavnar

Í Keypmannahavn knýtti Jan fleiri nýggj vinabond og kom eitt nú í samband við fleiri modellir:

– Eg hitti ein drong, ið nú er mín besti vinmaður. Hann arbeiddi tá og nú burturav á einum tí størsta modellmiðdeplinum í Danmark – Unique – og gav mær dyggan stuðul og góða hjálp at halda fram í modellheiminum. So eg gavst í skúlanum og fór í læru sum stylist hjá 6 Agency og arbeiddi sum modell við síðuna av, sigur Jan.

Í februar í ár fekk Jan prógv handað sum stylistur og valdi eftir hetta aftur at fara til London at arbeiða í eitt tíðarskeið fyri at fáa nýggjar avbjóðingar. Í London er Jan framvegis og hevur fingið góðar modelluppgávur á kalendaran. Eitt nú hevur hann júst fingið eitt gott tilboð úr Milano, sum stendur á skránni í næstum.

### Ongantíð ein dreymur

Jan sannar, at hann sum yngri ongantíð hevur droymt um at gerast modell, men heldur hevur hansara stóri barnadreymur verið at gerast tónleikari og sangari:

– Men tá kjansurin at gerast modell brádliga stóð framman fyri mær, tók eg sjálvandi bara av møguleikanum og fór við upp á tokið. Og higartil angri eg onga løtu, at eg tók hesa avgerðina fyri tveimum árum síðani, tí tað hevur avgjørt verið spennandi, sigur Jan og hyggur at mær við stórum, glaðum eygum, meðan hann leggur afturat, at sum nú er, ætlar hann sær at halda fram at arbeiða í modellheiminum:

– Eg ætli mær at arbeiða sum modell burturav, til eg aftur fari í skúla. Hesa ferð verður tað á hárfríðkanarskúla, sum eg síðan ætli mær at arbeiða við sum freelance í modellheiminum. Men somuleiðis ætli eg mær at arbeiða hálva tíð sum modell, tá eg fari undir lesnaðin.

### Ikki høgur og hvat so?

Hóast Jan bert er 1.73 metur til hæddar, hevur hæddin ongantíð darvað honum í hansara arbeiði.

– Vanliga verður sagt, at skal ein drongur arbeiða sum modell, skal hann í minsta lagi vera 1.80 metur til hæddar, men higartil hevur hetta ikki givið mær stórar trupulleikar, sigur Jan.

### Ikki bert dansur á rósum

Jan ásannar, at tað ikki bert er ein dansur á rósum at arbeiða í modellheiminum:

– Nei, hetta er ikki bara eitt luksus arbeiði, sum tað kanska sær út til at vera í bløðum og øðrum. Tað er avgjørt eitt hart lív, ein livir í modellheiminum. Eitt nú tá eg skal til »fotoshooting«, skal eg møta klokkan fimm um morgunin og arbeiða út í eitt til á kvøldi. Og teir flestu agentarnir í modellheiminum leggja í roynd og veru einki í modellirnar hjá sær, fara illa við teimum og hugsa bara um at fáa sínar pengar í kassan. Men ætlar ein at verða modell, noyðist ein somuleiðis at taka tær ringu síðurnar við. Tá er tað eisini sera umráðandi at vera líkaglaður við ljótu viðmerkingarnar og ansa eftir sær sjálvum, sigur Jan.

Viðmerkingarnar, Jan hevur fingið frá ymsu agentunum, hava verið mangar:

– Antin er ein ov klænur, tjúkkur, lítil ella hevur kanska ljót kinnabein. At fáa slíkar viðmerkingar er ofta rættiliga drepandi og ein fer niður við nakkanum, men tá er tað sera gott at hava góðar vinir at práta við, so ein kemur upp aftur. Men við tíðini lærir ein somuleiðis av hesum viðmerkingunum og fær ein breiðari rygg at bera ókrútið á, staðfestir Jan.

### Rúsevni og rúsdrekka

Jan játtar somuleiðis, at í modellheiminum hava rúsevni og rúsdrekka sínar góðu dagar, og at um ein ikki er sterkur og megnar at standa ímóti mongu freistingunum, kann ein lættliga verða lokkaður út í óføri:

– Tað eru veruliga nógvar modellir, sum eru rúsevnismisnýtarar – kanska serliga gentur. Og tað er veruliga frustrerandi dagliga at síggja, hvussu illa rúsevni fara við nógvum modellum.

Jan sigur, at tað er sera umráðandi at vera sterkur, siga nei takk og at halda seg langt frá øllum rúsevnum, tí um ein fyrst byrjar eina ferð, er tað sera trupult at steðga aftur:

– Ein av mínum góðu vinum hevði verið modell í fýra ár, áðrenn alt rapaði hjá honum. Eitt tíðarskeið gekk tað illa í arbeiðnum hjá honum, og hann hevði fáar uppgávur. Hann byrjaði síðan at taka rúsevni fyri at klára at halda fram í modellheiminum. Eftir hetta sá eg hann ikki í eitt hálvt ár, tí eg ynski altíð at halda meg langt frá rúsevnisumráðnum. Men fyri kortum sá eg hann aftur á einum diskoteki og gjørdist sera kløkkur. At byrja við kendi eg hann veruliga ikki aftur, tí hann var broyttur so ómetaliga nógv bæði í útsjónd og í verumáta. Hann hevði mist sítt modellarbeiði og var nú í síni heild sera langt úti, sigur Jan syrgin og leggur afturat, at ein kemur í tílíkar støður, tí ein verður trýstur langt út um síni mørk og klárar tískil ikki at standa ímóti pressinum í modellheiminum.

– Ein noyðist fullkomiliga at halda seg niðri á jørðini og ikki sveima á skýggjum í hesum arbeiðnum.

Í vinarbólkinum hjá Jan hava tey í felag gjørt sær eitt motto, ið sigur, at tey skulu halda seg langt frá rúsevnum, men heldur hava tað stuttligt við rúsdrekka.

### Elskar tó sítt arbeiði

Hóast nógvar keðiligar og skitnar síður eru aftan fyri fasaduna í modellheiminum, gleðist Jan tó hvønn dag um sítt arbeiði sum modell:

– Tær góðu síðurnar eru sjálvandi eisini mangar, tí annars hevði eg jú ikki tímað at verið modell. Í modellheiminum hittir tú eitt nú alla tíðina nógv nýggj og spennandi fólk úr øllum heiminum. Eg havi hitt Maria Carey, Sugababes, Helene Christensen, Mads Mikkelsen og Anne P í Top Models á sjónvarpsrásini TV3. Tú ferðast eisini nógv í hesum arbeiðnum, og tað haldi eg er sera spennandi. Somuleiðis eru nógvar góðar veitslur á skránni eftir loknan arbeiðsdag, og tað er jú altíð stuttligt, sigur Jan at enda við einum smíli og fer síðan skundisliga út úr Miðlahúsinum í Vágsbotni, tí hann noyðist at skunda sær heim at pakka. Í morgin er Jan aftur í London, har ein myndamaður, stylistur og make-up artistur standa og bíða eftir honum, tí tey øll í felag skulu gera eina myndafrásøgn, ið verður víst í framsýningarhølum í London seinni í ár.



*"Antin er ein ov klænur, tjúkkur, lítil ella hevur kanska ljót kinnabein. At fáa slíkar viðmerkingar er ofta rættiliga drepandi og ein fer niður við nakkanum, men tá er tað sera gott at hava góðar vinir at práta við, so ein kemur upp aftur."*

